FISKIMÁLARÁÐIÐ

# Fiskimálaráðið søkir eftir avloysara fyri fulltrúa

## Starvið

Talan er um eitt avloysarastarv fyri fulltrúa í farloyvi til 1. mars 2021. Starvið fevnir serliga um uppgávur í sambandi við fiskiveiðisamráðingar, sjófeingislógina og fyrisiting í tí sambandi umframt at gera kunngerðir fyri føroysk skip í føroyskum og fremmandum sjógvi og fremmand skip í føroyskum sjógvi. Roknast kann við nakað av fundarvirksemi uttanlands.

## Førleikakrøv

- Tú hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi í til dømis stjórnmálafrøði, fiskivinnufrøði ella løgfrøði.
- Vit leggja dent á, at tú hevur hegni at síggja møguleikar í eini samráðingarstøðu.
- Tú arbeiðir sjálvstøðugt og við nærlagni, dugir at leggja til rættis, samstarvar væl og virkar til lítar í einum umhvørvi, har mál kunnu hava nógvan skund.
- Tú hevur eisini lætt við at orða teg munnliga og skrivliga á føroyskum og enskum.
- Starvsroyndir innan nevndu høvuðsuppgávur og frá almennari fyrisiting eru ein fyrimunur

## Vit bjóða

Vit bjóða eitt starv, har tú fert at arbeiða við fjølbroyttum og fakliga mennandi uppgávum saman við starvsfeløgum, ið hava hollar royndir innan ymiskar yrkisgreinar.

## Starvstreytir

Starvsstaðurin er Fiskivinnustovan. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar tess, umframt Løgmanskrivstovuna og stjórnarráðini annars. Løn og setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

## Umsóknir

Umsóknir við avritum av prógvum, lívsgongdarlýsing og møguligum øðrum viðkomandi skjølum skulu sendast til Fiskimálaráðið, Yviri við Strond 15, Postrúm 347, 110 Tórshavn ella til fisk@fisk.fo og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin 2. apríl 2020.

Fiskimálaráðið
Yviri við Strond 15 • P.O. Box 347 • FO-110 Tórshavn • Føroyar
Tel. (+298) 35 30 30 • Fax (+298) 35 30 35 • fisk@fisk.fo • www.fisk.fo

**Fyrispurningar um starvið kunnu setast Andras Kristiansen, deildarstjóra, tel. 553241 ella um t-post til andras.kristiansen@fisk.fo.**

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í landsfyrisitingini, ið veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í Fiskimálaráðnum starvast 16 starvsfólk. Umsitingarøkið fevnir um fiskivinnumál, fiskiveiðieftirlit, fiskirannsóknir og gransking, inntøkutrygd fiskimanna, hvalamál, bjarging, tilbúgving, trygd og veðurtænastu.*